# Tvøroyrar Býráð setir ófrávíkiligt krav

**Nýggja samferðsluhavnin á Tvøroyri skal vera liðug tá ið nýggja suðuroyarferjan er liðug. Og Býráðið krevur eisini at verða tikið við í byggingini**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

– Tann nýggja samferðsluhavnin á Tvøroyri skal verða liðug, tá ið nýggja suðuroyarskipið er liðugt.

Tað krevur Tvøroyrar Býráð.

Á býráðsfundi mánakvøldið samtykti Tvøroyrar Býráð einmælt at senda landsstýrinum brævkan, har tað er eitt ófrávíkiligt krav, at tá ið nýggja suðuroyarferjan er liðug, væntandi mitt í 2004, skal tann nýggja samferðsluhavnin á Tvøroyri eisini verða liðug.

Tað var Kristin Michelsen, býráðslimur, sum legði uppskotið fram.

Hann segði, at fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, í Sosialinum herfyri luftaði tankan um, at tað kanska fór at vera neyðugt hjá nýggja suðuroyarskipinum at sigla á Vág ta fyrstu tíðina, eftir at tað er liðugt.

Tað er tí at landið ætlar ikki at byggja fyri meiri enn einar 200 milliónir um árið og at tað tí ikki er vist, um umstøður vera til at gera nýggju samferðsluhavnina á Tvøroyri lidnað samstundis sum nýggja ferjan er liðug.

Tí kann tað henda, at tað verður neyðugt hjá skipinum at sigla til Vágs burturav tað fyrstu tíðina, kanska nakrar mánaðir, ella eitt ár.

Men hetta vil Kristin Michelsen og restin av býráðnum á Tvøroyri ikki góðtaka.

Í Tvøroyrar Býráð er støðan tann, at tey seta seg ikki upp ímóti, at Smyril siglur á Vág, tí tað hevur Løgtingið samtykt at hann skal.

Men býráðið góðtekur ikki, at drála verður við nýggju samferðsluhavnini á Tvøroyri og krevja, at hon verður gjørd beinanvegin.




*Soleiðis hugsar Landsverkfrøðingurin sær eina nýggja samferðsluhavn á Drelnesi. Hon ligur beint innanfyri Lítluhólmar, 800 metrar uttanfyri Drelnes. Men Tvøroyrar Býráð átalar, at tað als ikki er tikið við upp á ráð*

## Neyðugt við nýggjari havn

Og at tað verður neyðugt við nýggjari samferðsluhavn er greitt.

Býráðið hevur fingið fyrispurning um at byggja Drelnes út, so at nýggja suðuroyarferjan kann liggja har. Men býráðið hevur sagt nei, tí ætlanin er at brúka havnina á Drelnesi til onnur endamál.

Sostatt er onki at gera, uttan at byggja nýggja havn.

Býráðið á Tvøroyri fýlist eisini á, at tað onki hevur fingið at vita um ætlanirnar at byggja nýggja havn á Trongisvágsfjørði.

Býráðslimir finnast at, at ein nýggj havn verður gjørd á fjørðinum, uttan at kommunan fær tað allarminsta at vita.

Í brævinum til Landsstýrið krevur býráðið tískil eisini at verða tikið við upp í byggingina.

## Longur út á fjørðin

Fyribils hevur Landsverkfrøðingurin funnið eitt økið longur úti á Trongisfjørði, har tað verður hildið at ein samferðsluhavn liggur væl. Talan er um eitt økið beint innanfyri Lítluhólmar einar 800 metrar uttanfyri Drelnes.

Modelroyndir skulu nú vísa, akkurát, hvar nýggja havnin liggur best og hon verður so flutt úteftir ella inneftir, alt eftir, hvar modelroyndirnar vísa, at hon liggur best.

# Tvørafólk noyðast aftur at repa seglini

**Á fíggjarætlanini fyr komandi ár, verður ikki roknað við vøkstri. Men um eini fimm, seks ár fer at síggja ljósari út, tí tá er skuldin væl niðurgoldin**

KOMMUNUSKULD
*Áki Bertholdsen*

Tvørafólk hava rættiliga fingið seg roynd hesi seinastu árini. Upp á seg, hevur Tvøroyrar Kommuna verið ein hin allarmest skuldarbundna kommunan í landinum, og tí hevur skattaprosentið eisini verið í topp nú í nógv ár.

Og tað verður ikki tey allarfyrstu árini, at tað fer at lætta í hjá tvørafólki.

Á býráðsfundi mánakvøldið varð uppskotið fyri fíggjarætlan fyri 2002, lagt fram.

– Eg kann ikki siga, at tað sær so ljóst út, segði borgarstjórin, Finnleif Guttesen, tá ið hann legði ætlanina fram.

Hann vísti á, at fyrstu mánaðirnar í ár er skattainntøkan hjá kommunini lækka afturímóti fyrstu mánaðunum í fjør og at tað onki var, sum bendi á, at inntøkan fer at hækka komandi ár.

Tí er heldur ikki roknað við vøkstri á fíggjarlógini næsta ár.

Næsta ár er skattainntøkan sett til tað sama, sum hon verður í ár, tvs, til 40,2 milliónir.

Harafturat kemur, at kommunan hevur gjørt eina avtalu við Landsbanakan og Unibank um kommunuskuldina.

Eftir avtaluni, skal kommunan betala ikki minni enn 40% av inntøkunum í rentum og avdráttum hvørt ár.

Tað gevur ímillum 16-17 milliónir í ár og næsta ár.

Afturfyri ber avtalan í sær, at 10 milliónir av gjaldinum er avdráttir, restin er renta.



*Lítið og onki av nýggjum fer at verða gjørt á Tvøroyri tey næstu árini, men um eini fimm-sjey ár, fer at síggja ljósari út*

Sostatt minkar skuldin 10 milliónir um árið.

Í løtuni er skuldin slakar 113 milliónir, ella 2,8 álíkningar.

## Glottar fyri framman

Men hetta ber samstundis í sær, at um eini seks, sjey ár er skuldin komin niður ímóti einari álíkning og tá fer at síggja ljósari út aftur.

Eftir nýggju kommunulógini, kann ein kommuna ikki skylda meiri enn eina álíkning.

Skyldar ein kommuna minni enn eina álíkning, kann hon læna upp til eina álíkning. Annars mugu allar útbyggingar gjaldast av rakstrinum.

Tað ber so aftur í sær, at á Tvøroyri fer lítið og onki at verða gjørt av íløgum tey næstu árini, tí fyribils snýr tað mesta seg um at gjalda skuld niður.

## Nýggjan sáttmála um Drelnes

Tvøroyrar Býráð eru nú í ferð við at gera ein nýggjan leigusáttmál um samferðsluhavnina á Drelnesi.

Tað er ein sáttmáli sum ásetur, hvussu nógv Strandferðslan skal betala fyri at brúka havnina.

Men tað er samsatundis ein sáttmáli, sum ikki gevur Strandferðsluni stórvegis rættindi og tí kann tað verða so skjótt, at Smyril verður trokaður burtur.

Tað er ein eisini ein orsøk til, at býráðið heldur, at tað hevur skund at gera nýggju samferðsluhavnina á Drelnesi.

Sáttmálin kann nevniliga verða sagdur upp við einum mánaða ávaring, um Býráðið ætlar at brúka havnina til onnur endamál.

Harumframt er tað greitt, at eftir sáttmálanum kann annað virksemi fara ígongd á Drelnesi, ímeðan hon eisini verður brúkt sum samferðsluhavn. Sostatt kann tað vera so skjótt, at Smyril verður trokaður burtur.



# - Hetta er ræðuligt

**- Fólk eru skelkað, og tey vilja hava hevnd fyri hesi ræðuligu álop, sigur Magnus í Brekkunum, sum er búsitandi nærindis New York**

YVIRGANGUR
*Eyðun Klakstein*

Kring alt USA vóru fólk skelkað av umfatandi yvirgangsatsóknini týsdagin, og eisini føroyingar, sum eru búsitandi í USA, merktu avleiðingarnar av álopunum.

– Alt steðgaði upp, handlar, bankar og almennir stovnar lótu aftur, og fólk fóru heim frá arbeiðið, eftir at álopini vóru gjørd. Hetta var ein ræðulig hending, og fólk eru skelkað, sigur Magnus í Brekkunum.

Hann hevur síðani november mánað búð í lítla býnum, Brookhaven, sum liggur beint uttan fyri Philadelphia. Tað eru einir tveir tímar at koyra til New York, og Brookhaven liggur eisini nærindis staðnum í Pensylvania, har eitt flogfar datt niður.



*- Tað kennist sum alt steðgar upp, tá nakað so álvarsamt hendir. Men vit royna at koma víðari við gerandisdegnum, hóast hetta ræðuliga álop, sigur Magnus í Brekkunum, sum býr nærindis New York*

Magnus arbeiðir sum elektrikari, men hann hevði frí frá arbeiði týsdagin

– Tá eg tendraði sjónvarpið í morgun, var tað óveruligt at síggja, hvat var hent. Tað er ikki tað sama at frætta slíkt, tá tú býrt í Føroyum, og nú tá tú býrt mitt í tí, sigur Magnus í Brekkunum, tá vit tosaðu við hann týskvøldið.

## Fólk vilja hava hevnd

Grannar og fólk í býnum, har Magnus býr, eru sera illa við av álopunum.

– Fólk eru ill, og tey krevja hevnd fyri hesi álopini. Kenni eg forsetan rætt, so fara tey eisini fáa tað. Eg stúri bara fyri, at alt kann fara ov vitt, sigur Magnus í Brekkunum.

– Tað var ræðuligt at síggja, at nakað so ógvusligt kundi henda so nær hjá okkum. Tað er trupult at fata, at hetta er veruleiki. Fólk halda, at hetta er verri enn tiltikna álopið á Pearl Harbour.

Eftir at tíðindini frættust týsmorgunin um, at umfatandi yvirgangsálop høvdu verið fleiri staðni í USA, vistu fólk ikki, um álopini vóru liðugt, ella um meira var á veg.

– Vit kenna okkum framvegis ikki trygg í, at yvirgangurin er steðgaður. Tað sást eisini í dag, at eingin kendi seg tryggan. Tað varð sagt, at amerikanski forsetin skuldi fara aftur til Washington, men hann varð flogin til fleiri onnur støð í USA við Air Force One. Vandin fyri fleiri álopum var tikin í størsta álvara, sigur Magnus.

## Aftur til arbeiðis

Mikumorgunin skuldi Magnus aftur til arbeiðis, og næsta uppgávan var í Conneticut, sum liggur norðan fyri New York.

– Ein starvsfelagið hjá mær skuldi til arbeiðis har í dag, men ferðin varð avlýst orsaka av álopunum. Í morgin fara vit báðir avstað, men vit verða helst noyddir at koyra ein fittan umveg, tí allir vegir í nánd av New York vórðu stongdir í dag, sigur Magnus í Brekkunum.

– Tað kennist sum alt steðgar upp, tá nakað so álvarsamt hendir. Men vit royna at koma víðari við gerandisdegnum, hóast hetta ræðuliga álop, sigur Magnus.

# Ferðamálið rapaði

**Um tvær vikur skal HF-flokkur í Klaksvík til New York á námsferð, men tað verður ein fullkomiliga broyttur býur, tey sleppa at vitja. Næmingarnar ætla sær avstað hóast ræðuligu hendingarnar í býnum týsdagin**

NEW YORK
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Seinasta árið hava næmingar á HF-skúlanum í Klaksvík savnað pengar til eina námsferð til amerikanska stórbýin New York.

Týsdagin var ferðamálið hjá HF-næmingunum rakt av ógvusligum yvirgangsálopi, sum eftir øllum at døma hevur kostað túsundtals mannalív. Men hetta fær ikki næmingarnar at setast aftur.

– Í løtuni vita vit ikki við vissu, hvussu tað verður við ferðini, men tað skulu vit tosa við ferðaskrivstovuna um í dag. Vit hava goldið fyri ferðaseðlarnar, og verður flogferðslan tikin uppaftur, so ætla vit okkum avstað, sigur Jákup Michaelsen, sum er ein av næmingunum í flokkinum.

16 næmingar og 2 lærarar skulu á ferðina til New York, og hóast tey vóru ovfarin av hendingunum í býnum týsdagin, so vóna tey at sleppa avstað. Tey skulu avstað 28. september, og tey skulu brúka einar 10 dagar til námsferðina.



*HF-næmingar í Klaksvík skulu um tvær vikur til New York á námsferð, og hóast býurin týsdagin var raktur av øðiligum yvirgangsálopi, ætla næmingarnir sær avstað*

## Øðrvísi ferð

Mest sum á hvørjum ári eru næmingar á HF-skúlanum uttanlands, og tá tey, sum nú ganga í 2. flokki, byrjaðu á skúlanum fyri einum góðum ári síðani, samdust tey um, at leiðin skuldi liggja til USA.

Undanfarin ár hava flokkarnir vitjað í Norðurlondum, ymstaðni kring Miðalhavi og á onkrum sóloyggjum, og hóast ferðini til New York kostar hálvtannað hundrað túsund krónur, so fóru næmingar í holt við at savna pengar til hesa ferðina.

Tey hava havt nógv tiltøk seinasta árið, og so seint sum seinasta vikuskiftið høvdu tey loppumarknað, og um eina góða viku er tarvakapping á skránni.

## Broyttur býur

2. p ætlar sær at vitja ymisk kend støð í New York, og nógv av hesum liggja á Manhattan, har eisini World Trade Center liggur.

Mikumorgunin kallaðu fólk hjá sjónvarpsrásini CNN Manhattan fyri eitt krígsøki, og tað er tað júst í yvirgangsrakta økinum, at HF-flokkurin skal halda til í meira enn eina viku.

– Tað verður neyvan sami býurin, sum vit ætlaðu okkum til, sum vit nú koma við. Hesar øðiligu hendingarnar hava uttan iva broytt býin, heldur Jákup Michaelsen.

– Vit hava tosað um ferðina í dag, og hóast fólk eru illa við av hendingunum, so ætla øll sær avstað.

Jákup helt fyrst, at talan var um skemt, tá onkur ringdi til hann og greiddi honum frá, hvat var hent í New York.

– Men hetta vísti seg at verða óhugnaligi veruleikin, og hóast tað er ávísur spenningur í at fylgja við, so er hetta ræðuligt, sigur hann.

Landsfundur Javnaðarfloksins
í Vestmanna 14. og 15. september